

## Gass í Barentshavinum

Norska oljumálaráðið sigur, at StatoilHydro hevur funnið gass í einum brunni norðanfyri Norðkapp. Í stutta tíðindastubbanum, sum kann lesast á heimasíðuni hjá FiskeribladetFiskaren, stendur, at brunnurin, har StatoilHydro hevur funnið gass, er 16 sjómíl norðanfyri Norðkapp. Aðrastaðni í sama greinastubba stendur, at brunnurin er funnin 160 kilometrar norðanfyri Norðkapp. Sambært norska oljumálaráðnum er í hvussu er greitt, at felagið hevur funnið gass í Barentshavinum, og at hetta er fyrsti kanningarbrunnurin í útbjóðingarumfarinum 394, sum var í 2006. Norska oljumálaráðið sigur, at enn er ov tíðliga at siga, um talan er um rakstrarverdar nøgdir av gassi í brunninum. Myndin, vit prenta saman við hesum greinastubbanum, er úr FiskeribladetFiskaren. *(-vilmund)*

# Tað kundi gingið galið




*- Tað stóð nógv á, men tíbetur eydnaðist at loysa skipið í øllum góðum, sigur brandmeistarin í Fuglafirði, Jóhan Clementsen*

*Mynd: Høgni Thomsen*

**- Tað kundi gingið galið, um skipið ikki fekst av aftur, áðrenn tað rættiliga fjaraði, sigur brandmeistarin í Fuglafirði, Jóhan Clementsen, sum heldur, at Næraberg, sum lá á Fuglafirði og var klárur at koma til hjálpar, saktans kundi togað kypriotiska farmaskipið leyst úr landi. Skipið hevði nevniliga 300 tons av tungolju í tangunum**

FUGLAFJØRÐUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár kundu Føroyar aftur verið vitni til eina dálkingarvanlukku, tá stívliga hundrað metrar langa farmaskipið Forline 1, sum hevur heimstað í Limasol á Kypros, endaði uppi í grótkastinum við deksbátahavnina í Fuglafirði.

Tað var stutt fyri døgurða í gjár, at farmaskipið, sum um náttina hevði ligið uppankrað á Pollinum í Fuglafirði, kom inneftir vánni við heldur nógvari ferð.

Ein russiskur trolari, sum eisini hevði ligið við Pollin um náttina, kom í øllum góðum til bryggju í Fuglafirði fyrr um morgunin, og ætlanin var, at farmaskipið skuldi leggja uppat síðuna á trolaranum.

Farmaskipið, sum í lágættarvindinum stevndi inn á Fuglafjørð, var tómt og hevði eftir øllum at døma eisini ov nógva ferð.

Í fyrstu atløgu rendi skipið bulbustevnið inn í bryggjuna aftanfyri russiska trolaran, sum lá undir Vónavirkinum. Hol kom á stevnið, sum tó var so mikið úr sjónum, at sjógvur ikki kom í skipið.

Í aðru syfti royndi skiparin á Forline 1 at bakka útaftur, men tá megnaði hann ikki at hava tamarhald á skipinum, sum tók nógvan vind á seg.

Úrslitið var, at kypriotiska farmaskipið endaði uppi í grótkastinum við deksbátahavnina.

Við bryggjuna í Fuglafirði lá uppisjóvarskipið hjá JFK í Klaksvík, Næraberg, sum var fúsur at koma farmaskipinum til hjálpar. Aðrir bátar vóru eisini skjótir á staðið, eitt nú Ziska og Pilot.

Bjargingarfeløg og fólk hjá Fuglafjarðar Sløkkiliði vóru eisini á staðnum, men manningin á farmaskipinum var ongantíð í lívsvanda.

Vandin var, at hol kundi komið á skipið, sum við bakborðssíðu fyri lá og gnaddaði upp í grótkastið.

Meðan Forline 1 soleiðis lá uppi í grótkastinum, vóru kavarar, sum Faroe Ship hevði boðsent, niðri, og einki bendi á, at hol var komið á skipssíðuna. Tað var mest slengrikjølurin á




*Noreg kannar sær rættin til at umsita havøkið við Svalbard*

# Noreg tók russiskan trolara

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Norska vaktartænastan tók í gjár nýggja russiska trolaran, Nikolai Afanasjev, í Svalbard-økinum. Vaktartænastan sigur, at veiðidagbókin hjá russiska trolaranum var ikki rætt førd. Sum skilst, eru tey á fiskivinnuskrivstovuni í Moskva ikki serliga fegin um tøkuna av Nikolai Afanasjev.

**Ósemja**

- Noreg heldur ivaleyst, at hesi økir hoyra undir norskt búskaparligt øki. Men hetta stríðir ímóti París-sáttmálanum frá 1920. Hvørki Russland ella nakað annað land í heiminum hevur góðkent hesar leiðir sum norskt búskaparligar, sigur kunningarleiðarin á fiskivinnuskrivstovuni í Moskva, Aleksander Saveljov.

Tað er sjónvarpsrásin Vesti, sum ber hesi tíðindi.